# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein óræddur Laksáfoss

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur sitið stutt í sessinum, men navn hansara hevur longu verið á breddanum fleiri ferðir, vegna útsagnir um førda búskaparpolitikkin. Seinast var hetta í samband við ætlaða Sandoyartunnilin.

Tað, sum landsstýrismaðurin førir fram, fellur sum vitiligt er ikki í góða jørð á Sandoynni, men kortini tykist Magni Laksáfoss at fáa udirtøku frá fleiri og óræddur má hann sigast at vera.

Mangt er broytt her á landi síðani fyrsta ætlanin um undirsjóvartunnil um Vestmannasund varð steðgað eftir undirskriftainnsavning kring landið. 10 ár seinni fór verkætlanin í gongd aftur, og stutt eftir bankaðu Norðoyggjar á dyrnar og vildu hava fast samband við Miðøkið. Tá kjakið um Norðoyatunnilin var í hæddini fyri umleið 7 árum síðani vóru fleiri atfinningarsamar politiskar røddir. Kortini varð anlegslógin samtykt og nú er koyrandi til Klaksvíkar.

Tað kundi tí verið áhugavert at hugt nærri at teim turru tølunum í samband við Norðoyatunnilin og Vágatunnilin og samanborið hetta við ætlaða Sandoyartunnilin.

Brúkarin rindar ein part av íløguni í báðum undirsjóvartunnlinum og landið rindar sín part. Landskassans partur kann uppgerast soleiðis.

| | |
|---|---|
| Norðoyatunnilin | 235 mió |
| Vágatunnilin | 160 mió |
| Tilsamans | 395 mió |

Samanbera vit hetta við Sandoyarrunnilin, so kemur landið helst at rinda alla íløguna, ið verður umleið 700 mió. Hetta merkir, at Sandoyartunnilin kemur at kosta landskassanum umleið 300 mió meira enn Vágatunnilin og Norðoyatunnilin tilsamans.

Við eini almennari útreiðslu uppá 395 mió hava vit knýtt flogvøllin og 9000 borgarar uppí Miðstaðarøkið, og helst var hetta skilagóð raðfesting.

Nú skulu vit nýta 700 mió fyri at knýta 1400 borgarar uppí Miðstaðarøkið. Magni Laksáfoss kennir tað búskaparliga handverkið. Hann er fakmaður. Kanska er tað orsøkin til at hann biður okkum steðga á.

**Sosialurin**

## Gjøgnumskygni í bankasøluna

SAMTAK

Fyri tveimum vikum síðani átti føroya fólk ein banka – nú eiga vit bert eitt sindur av honum og ein hóp av ósvaraðum spurningum. Tí hvat var tað í veruleikanum sum hendi, tá stórur partur av Føroya Banka var seldur. Høvdu ávísir framíhjárætt? Mistu vit 1 milliard?

Samtak krevur, at gjøgnumskygni kemur í bankasøluna, og at ein óheftur kanningarstovnur verður settur at útgreina, tað ið farið er fram higartil í málinum. Samstundis undrast Samtak á ta løgnu mannagongd við søluni av listaverkunum. Listaverkini, sum landið átti, skal landið nú keypa fyri fleiri milliónir krónur – hetta tykist heilt løgið.

Tað standa nógvir ósvaraðir spurningar, sum serliga landsstýrið og fíggingargrunnurin eiga at svara; – men fyrst og fremst vantar gjøgnumskygni.

Felagið heitur á landsstýrið um at steðga við øllum einskiljingum til hetta kann gerast á rætta hátt almennu føroyum at gagni. Álitið sum fakfeløgini hava á landsstýrið og politisku skipanina í hesum máli hevur í øllum føri fingið eitt álvarsamt skot fyri bógvin.

Ein spurningur er eisini, hví kundu føroya fólk ikki fingið partabrøv til gávis? Tað eru verri enn so øll fólk í Føroyum, sum høvdu møguleikan at keypa sín part í bankanum. Fólkið hevur rindað fyri bankan minst einaferð.

Gjøgnumskygni er minsta krav!

## Oljumilliardir og aðrar milliardir

HELGI ABRAHAMSEN



Júst sum eg var við at enda blaðkjakið við formannin fyri "Ung fyri Miðflokkin", Tóra Højgaard, kom fyrrverandi formaðurin fyri sama felag, Arni Abrahamsen innaftur í kjakið. Eg sendi tí eisini honum hesa endaligu viðmerkingina.

Arni harmast um, at eg havi lagt hann undir at kalla 2 milliardir krónur fyri "smápengar", og eg má geva honum rætt í tí, at hann brúkti ikki tað orðið í greinini. Men hinvegin, so kann tað gera tað sama um vit kalla 2 milliardir fyri "smápengar" ella "ikki nógvir pengar", tí hvørki er rætt. Tvær milliardir eru nevniliga rættiliga nógvir pengar. Tað er nógv meira enn allir føroyingar tilsamans gjalda í landsskatti í eitt heilt ár. Tí gleðir tað meg, at Arni nú brúkar yvirskriftina "Nei milliardir eru ikki smápengar", tí tað sum loysingarflokkarnir hava tveitt burtur síðani 2002 er alt annað enn smápengar.

**Allir pengar mugu stýrast**

Eg spurdi Arna í fyrru greinini, um hann vil mæla til, at øll oljuleiting við Føroyar verður steðgað, eins og hann mælir til, at blokkstuðulin verður avtikin. Eg vísti í tí sambandi á, at um búskapurin ikki tolir at fáa blokkstuðul, so tolir hann heldur ikki at fáa oljukekkar.

Arni gevur mær rætt í tí, at oljupengar kunnu fáa somu ávirkan á búskapin sum blokkstuðulin hevur, "men", sigur hann, "her veldst mest um búskaparstýring".

Júmen ger tað ikki altíð tað? Líkamikið um pengarnir eita oljupengar, blokkstuðul ella skattakrónur, so mugu vit hava búskaparstýring. Vit kunnu ikki siga neitakk til stórar inntøkur, fyri at sleppa undan at stýra pengunum?

**Vit gera ikki olju**

Arni sigur, at munurin ímillum blokkstuðul og oljuinntøkur er, at blokkstuðulin er ein reinur stuðul, sum ikki kemur inn vegna virksemi í landinum, men verður olja funnin, so fer tað at skapa eina vinnu, sum framleiðir virði til landið.

Eg ivist í, um hetta er so einkult, tí hvussu stórur partur av oljupengunum koma frá føroyskari framleiðslu? Skulu vit til dømis siga við oljufeløgini, at tey eru vælkomin at pumpa so nógva olju upp úr føroysku undirgrundini sum teimum listir, og at tað einasta sum vit skulu hava afturfyri, er løn til teir føroyingar, sum fáa arbeiði innan oljuvinnuna, ella avleiddar vinnur? Er tað nóg mikið at krevja, at føroyskar fyritøkur fáa arbeiði, ella skulu vit krevja meira enn tað? Og um vit krevja meira, kann tað so ikki samanberast við blokkstuðulin? Og um blokkstuðulin er oyðileggjandi fyri búskapin, er hitt so ikki eisini oyðileggjandi? Og so aftur til spurningin: Kunnu vit so siga, at blokkstuðulin er skaðiligur, meðan oljupengarnir eru góðir?

**Hvat er endamálið?**

Arni hevur gjørt sær stóran ómak at rokna út, um tað loysir seg betur at avtaka restina av blokkstuðlinum í einum, ella yvir 10 ár. Hann kemur til ta niðurstøðu, at bara av inflasjón, rentubroytingum o.ø., kunnu vit spara 88 mió. krónur, ella 14% við at avtaka hann yvir 10 ár. Men hvat er endamálið við tí? Um endamálið er at spara, so er bara at lata blokkin fáa frið, tí so spara vit 100 %. Men er blokkurin so skaðiligur fyri búskapin sum tit vilja vera við at hann er, so er at fáa hann burtur sum skjótast, og helst fyri so høgan kostnað sum møguligt – minni verður "skaðin".

**Politiskt samstarv**

Arni endar greinina við at dyrgja eftir politiskum samstarvi aftaná komandi løgtingsval. Nú veit eg ikki hvørjar heimildir Arni hevur at úttala seg vegna Miðflokkin í somáta, men eg kann siga fyri Sambandsflokkin, at sum útgangsstøði standa allir møguleikar fyri samstarvi opnir, men tit mugu ikki rokna við, at tað verður saman við Sambandsflokkinum, at tit sleppa at stovna eitt føroyskt fullveldisríki, fyri síðani at senda rokningina til skattgjaldaran.

**Endi**

Sum sagt, so gevist eg her við kjakinum okkara millum. Vit verða helst ikki samdir kortini, og tá er tað í hvussu so er gott, at vit hava fingið lýst munin ímillum okkara sjónarmið. Vit liva í einum demokratiskum landi, har øll hava loyvi til at hava sína meining, og at argumentera fyri henni. Tað skulu vit í øllum førum virða og vera takksom fyri.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.